# Kann enda við kreppu í øllum Miðeystri

**Er samband millum hermannaburturflytingarnar hjá Hamas og Hizbollah, kann tað økja spenningin í Miðeystri munandi, siga serfrøðingar.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Neyvt tvær vikur eftir at Ísrael fór inn í Gaza at leita eftir einum burturfluttum hermanni, vórðu tveir aðrir ísraelskir hermenn burturfluttir við libanska markið. Tað er ein bólkur hjá Hamas, sum hevur burturflut hermannin í Gaza, meðan teir, sum hava burturflutt hinar báðar hermenninar, eru úr Hizbollah-felagsskapinum.

Søguliga hevur tann shiamuslimski Hizbollah ikki samstarvað við palestinunum, sum yvirhøvur eru sunnimuslimar, og undir libanska borgarakrígnum í áttatiárunum skipaði Hizbollah fyri fleiri blóðugum álopum á palestinskar flóttafólkalegur. Kortini heldur Mið-eystursefrøðingurin hjá BBC, Roger Hardy, at avgerðin hjá Hizbollah at burturflyta tveir ísraelskar hermenn hevur til endamáls at stuðla palestinunum í stríðnum við Ísrael. Harafturat hevur burturflytingin noytt Ísrael at stríðast á tveimum hermótum, har suðuri í Gaza og har norðuri við libanska markið, og tað var uttan iva eisini endamálið við burturflytingini, heldur Roger Hardy.

## Neyvan samstarv

Hann og aðrir Miðeystur-serfrøðingar eru á einum máli um, at er samband millum tær báðar burturflytingarnar, kann tað ein álvarssom hóttan ímóti friðinum í øllum Miðeystri. Teir vísa á, at fleiri av leiðarunum í Hamas og Hizbollah halda til í sýriska høvuðsstaðnum Damaskus.

-Viðurskiftini millum Hizbollah og Hamas eru ikki so spent, sum viðurskiftini millum Hizbollah og Fatah vóru. Báðir partar fáa dyggan stuðul úr Damaskus, og báðir hava ein felags fígginda, sum er Ísrael, sigur Miðeystur-serfrøðingurin Kari Karame við Dagsavisen.

Hizbollah hevur leingi stríðst fyri valdinum í Suðurlibanon, og felagsskapurin hevur ongantíð viðurkent markið millum Libanon og Ísrael. Tað hevur havt við sær, at bæði Hizbollah og ísraelski herurin hava eftirlit við markinum, og tað var í hesum økinum, at teir báðir hermenninir vórðu burturfluttir.

Norski Miðeystur-serfrøðingurin Åge Tiltnes heldur kortini ikki, at Hizbollah hevur burturflutt hermenninar fyri at hjálpa palestinunum í Gaza. Hann sigur, at Hizbollah hevur sítt egna stríð við Ísrael, og at hermenninir helst eru burturfluttir, so teir kunnu brúkast í einum fangabýti við Ísrael. Hetta hava teir roynt fyrr. Í 2004 eydnaðist tað Hizbollah at fáa 429 fangar úr ísraelskum fongslum í býti við ein ísraelsmann og leivdirnar av trimum deyðum ísraelskum hermonnum.

## Eisini Iran

Eitt annað, sum er hugvekjandi við burturflytingini hjá Hiabollah er, at felagsskapurin fær ikki bara stuðul úr Sýrialandi, men eisini úr Iran, og tí kunnu burturflytingin og ísraelsku álopini á mál í Libanon hava við sær, at kreppan fer at breiða seg til størri partar av Miðeystri, skrivar AP.

-Fyri aðru ferð í stutta tíð hevur Ísrael fingið eina avbjóðing, og fyri aðru ferð hevur landið valt at svara við hermegi heldur enn við samráðingum. Tað fer fyrst og fremst at raka sivilfólkið í Suðurlibanon, sigur norski granskarin Trude Strand við Dagsavisen.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, hevur gjørt greitt, at Ísrael slakar ikki ein tumma. Landið tilskilar sær rætt til at taka øll neyðug stig, og tað kemur ikki upp á tal at samráðast við yvirgangsmenn, sigur hann. Í gjár legði hann afturat, at libanska stjórnin má átaka sær ábyrgdina av, at teir báðir ísraelsku hermenninir vórðu burturfluttir á markinum.

*Libanar renna undan ísraelskum granatum.*



